

Áðrenn Silverstone

# Formel 1 í Englandi

Formel 1 koyringin á Silverstonebreytini í Englandi, verður uttan iva merkt av yvirgangsálopinum á London. Men fyrireikararnir vilja ikki lata seg kúga av yvirgangsfólki, koyringin verður hildin.

Tá USA vórðu álopnar 11. september 2001, var hetta beint frammanundan formel 1 koyringini í USA, og eisini tá varð koyringin hildin.

Á tíðindafundi hósdagin søgdu fyrireikararnir at trygdin rundan um koyringina verður enn strangari, sjálvt trúgv og roynd starvsfólk hjá formel 1 liðunum verða kannaði, áðrenn tey sleppa inn. Hetta hevði sambært pole-position.dk við sær, at tá ferraritaktikarin Ross Brawn skuldi til arbeiðis hósdagin, mátti hann pent lata, vaktarmenn kanna sínar taskur.

Á tíðindafundinum hósdagin var bretski koyrarin Jenson Button. Hann sendi sína samkenslu til øll tey, sum á onkran hátt vóru rakt av hesi ólukku. Hann segði, at hetta var ein ræðuligur máti at byrja eitt koyringar vikuskifti. Men hann vildi ikki lata yvirgangin vinna, so hann ætlaði sær at geva øllum eitt spennandi formel 1 vikuskifti.

**nud**

# Red Bull og David Coulthard hava longt sáttmálan

Tá David Coulthard skrivaði sáttmála við Red Bull Racing í fjør, var hetta ein eitt ára sáttmáli. Ætlanin var, at David Coulthard skuldi verða tann royndi koyrarin, sum legði lag á hjá ungu koyrarunum Christian Klien og Vitantonio Liuzzi, sum í 2006 skuldu koyra báðar Red Bull bilarnar. Men árið hjá David Coulthard hevur verið so framúr, at liðið hevur avgjørt at leingja sáttmálan. Bæði lið og koyrari siga seg vera sera glað fyri nýggja sáttmálan

David Coulthard hevur í ár fingið 17 stig fyri Red Bull Racing, og liggur á einum samlaðum 10. plássi í kappingini um heimsmeistaraheitið.

**nud**

# Hvør vinnur á Silverstone

Tað verður ivaleyst ein Renault ella ein McLaren-Mercedes koyrari, sum fer við sigrinum sunnudagin, væntandi eitur vinnarin antin Fernando Alonso ella Kimi Räikkönen. Bert ein vika er farin síðan Magny Cours, og á fronsku breytini vóru Renault og McLaren-Mercedes bestu liðini, neyvan munnu broytingarnar vera nógvar, sum liðini hava gjørt hesar dagarnar.

BMW-Williams bilarnir hava nýggjar motorar og ein nýggja aerodynamiskan pakka. Men BMW-Williams var so øðiliga aftarliga seinast, at tað nokk er ivasamt, um liðið kann gera seg galdandi.

Ferrari fingu triðja pláss í Fraklandi, Ferrari gevur 18 umferðum aftan fyri Trulli skuldina fyri, at Schumachersa koyring ikki gekk betur enn triðbest. Teir ætla tí at vísa, hvør dugur er í reyðu rasarabilunum.

Eisini Toyota hava góðar vónir, við fyrstu byrjunarstøðu í USA og næstu byrjunarstøðu í Fraklandi er Toyota bilurin sera skjótur, men ferðin var ikki líka høg í sjálvari koyringini. Um liðið hevur loyst hendan trupulleika, kunnu teirra koyrarar væl blanda seg í tann stuttliga endan.

Jenson Button fekk fyrstu stigini fyri BAR-Honda í Fraklandi seinasta vikuskiftið. Hanasara fjórða pláss hevur givið unga bretanum smakkin av stigum, og á heimabreytini kann hann kanska gera ein vørr.

Ein kanning sum motorítróttarfelagskapurin FIA hevur gjørt, vísir at Silverstone er tann triðjbest dámda breytini í formel 1. Tað eru vanligir formel 1 fjepparar, sum hava luttikið í kanningini. So hyggi við sunnudagin, og fái innlit í, hví júst henda breyt er so væl umtókt.

**nud**

## UM BRETSKU KOYRINGINA Á SILVERSTONE

**Umferðir:** 60
**Breytarlongd:** 5,141 km
**Skjótast umferð:** Michael Scumacher (Ferrari), 1 m 18,739 s
**Longdin á koyringini:** 308.355
**Núverandi koyrarar sum hava vunnið á Silverstone:**
Jaques Villeneuve 1996, 1997 (Williams-Renault) - Michael Schumacher 1998, 2002, 2004(Ferrari) - David Coulthard 1999, 2000 (McLaren-Mercedes) - Rubens Barrichello 2003 (Ferrari)

Kelda www.forix.com

# Ein nakin tíðindamaður

Formel 1 skrivarin hjá bretska blaðnum Daily Express skotin Bob McKenzie lovaði í fjør, at um McLaren-Mercedes vunnu eina koyring tað kappingarárið, so skuldi hann renna eina umferð á Silverstone nakin. Kimi Räikkönen vann stutt eftir á Spa breytini í Belgia, og tí skal skotin í ár ein rennitúr.

**nud**

# Vágadreingir gera um seg í Spania

Dreingjaliðið hjá FS Vágum 2004 er í løtuni við í kapping í Spania, har liðið stendur seg avbera væl.

Kappingin eitur Palencia Cup og er beint uttan fyri Madrid.

Vágadreingirnir hava spælt tríggjar dystir í innleiðandi bólkaspælinum.

Teir vunnu fyrst 5-0 á Tarm úr Danmark. Síðani var mótstøðuliðið Fuglbjerg úr Danmark, og tá vann FS Vágar 2004 ikki minni enn 10-0. Síðsti dysturin var móti spanska liðnum Huercal Overa, og tann dysturin endaði við málleysum javnleiki 0-0.

Teir eru tí komnir í hálvfinaluna, har teir skulu spæla móti spanska Huelva.

Dreingjaliðið úr Vágum fekk eisini steyp fyri at verða besta liðið fyrstu fýra dagarnar av kappingini.

## formuladeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skála | 15 | 8 | - | 5 | - | 2 | 32 | 17 | 15 | 29 |
| 2 B36 | 15 | 8 | - | 5 | - | 2 | 20 | 7 | 13 | 29 |
| 3 HB | 15 | 9 | - | 2 | - | 4 | 37 | 18 | 19 | 29 |
| 4 NSÍ | 15 | 5 | - | 6 | - | 4 | 22 | 20 | 2 | 21 |
| 5 EB/Streymur | 15 | 5 | - | 6 | - | 4 | 16 | 22 | -6 | 21 |
| 6 ÍF | 15 | 4 | - | 4 | - | 7 | 19 | 31 | -12 | 16 |
| 7 VB | 15 | 4 | - | 3 | - | 8 | 17 | 26 | -9 | 15 |
| 8 KÍ | 15 | 4 | - | 2 | - | 9 | 21 | 29 | -8 | 14 |
| 9 TB | 14 | 3 | - | 5 | - | 6 | 13 | 21 | -8 | 14 |
| 10 GÍ | 14 | 4 | - | 2 | - | 8 | 18 | 24 | -6 | 14 |